# Fimm í starvsvenjing

**Hesar seinastu vikurnar hevur 9. flokkur í Tvøroyrar skúla verið í starvsvenjing. Fleiri teirra valdu at fara til Havnar, og vit hava hitt tey og spurt um starvstíðina.**

STARVSVENJING
*Orð og myndir: Anna Rødgaard og Manja Johansen*



*Anna Rødgaard (v.m.) og Manja Johansen (h.m.) hava roynt mangt og hvat hesar vikurnar, tær hava verið í starvsvenjing á Sosialinum. Her royna tær fiskasuppu hjá Jórun í Klaksvík*



## Gott á hotellinum

**Sunneva Tausen Magnussen, 15 ár Tvøroyrar skúli**
**Starv:** Hotel Hafnia
*Hví valdi tú hetta starvið?*
- Tí eg hevði áhuga fyri hesum, og eg havi hugsað mær at læra til kokk tá eg verið eldri.
*Hvat hevur tú gjørt, meðan tú hevur verið her?*
- Eg havi serverað í eina viku og arbeitt í køkinum í eina.
*Hvussu dámar tær?*
- Ordiliga gott!
*Er hetta eitt starv, tú kundi hugsað tær, tá tú verður eldri?*
- Ja, men so hevði eg vilja verið útlærd kokkur áðrenn.



## Eg elski børn

**Senita Thomsen, 15 ár Tvøroyrar skúli**
**Starv:** Barnagarðinum - Lítlaskóg
*Hví valdi tú hetta starvið?*
- Tí eg elski børn og eg havi áhuga fyri tí.
*Hvat hevur tú gjørt, meðan tú hevur verið her?*
- Spælt við børnini, ruddað, skift og givið teimum at eta.
*Hvussu dámar tær?*
- Sera gott!
*Er hetta eitt starv, tú kundi hugsað tær, tá tú verður eldri?*
- Ja, heilt sikkurt! Eg ætli mær at læra til pedagog ella sjúkrasystur



## Spennandi advokatstarv

**Malan Vitalis Bærendsen, 15 ár Tvøroyrar skúli**
**Starv:** Advokatfirmaið hjá Poul Hansen
Hví valdi tú hetta starvið?
- Tí tað er mítt dreymastarv, og eg vildi vita, um alt var soleiðis eg hevði væntað.
*Hvat hevur tú gjørt, meðan tú hevur verið her?*
- Lisið sakir, skrivað dømi um stevning, verið í rættinum og annað skrivligt arbeiði.
*Hvussu dámar tær?*
- Væl! Tað er spennandi og her hendir nakað nýtt hvønn dag.
*Er hetta eitt starv, tú kundi hugsað tær, tá tú verður eldri?*
- Ja, og helst nú eg havi roynt tað.